## DAGSINS MEINING

# Ósemjan má loysast!

Enn einaferð er Landssjúkrahúsið í fokus vegna fakliga ósemju. Hetta, at fakligar ósemjur stinga seg upp er um ikki dagligur kostur, so alt ov vanligt á hesum stovni. Hesaferð er orsøkin tann, at leiðslan ætlar at fremja umleggingar á føðideildini. Hesar umleggingar hava sum fylgju, at eini seks ársverk hjá sjúkrarøktarfrøðingum verða spard burtur. Leiðslan leggur dent á, at her ikki fyrst og fremst er talan um sparingar men um menning av hesum parti av Landssjúkrahúsinum.

Felagið Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar hevur hvassliga fordømt avgerðina og hóttir við álvarsomum móttiltøkum, um leiðslan ikki broytir sína avgerð og letur alt vera sum fyrr. Felagið metir tað ábyrgdarleyst, at ljósmøður skulu taka yvir arbeiðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðinngar ger vart við, at økið ikki bert fevnir um frískar nýføðingar og frískar møður men eisini um sjúk børn og sjúk vaksin. Tað kann ikki góðtakast, at arbeiðið við hesum verður gjørt av fólki, ið ikki hevur neyðuga fakliga vitan verður sagt. Felagið fer so langt sum at siga, at leiðslan við ætlanum sínum setur pinkubørn í vanda. Hetta er ein sera álvarsom ábreiðsla.

Her er sostatt talan um eina sera álvarsama ósemju, har orð stendur móti orði. Tað er so langt ímillum støðuna hjá leiðsluni og støðuna hjá sjukrarøktarfrøðingunum, at almenningurin hevur krav uppá at fáa at vita, hvat hetta er fyri nakað. Hvat er tað, sum fyrigongur? Almenningurin verður ferð eftir ferð vitni til løgnar og mangan óskiljandi konfliktir á landsins størsta arbeiðsplássi. Vit hava rætt til at vita alt um hesar ósemjur. At tryggja frið og góða semju á einum arbeiðsplássi er fyrst og fremst ábyrgdin hjá leiðsluni - í øðrum lagi ábyrgd hjá øllum starvsfólkum. Leiðslan má í sínum virksemi tryggja sær, at allir starvsbólkar eru væl og virðiliga kunnaðir, tá avgerðir um stórar broytingar verða tiknar. Leiðslan má somuleiðis tryggja sær undirtøku fyri sínum ætlanum - hon má hava greið mál og greiðar strategiir fyri útinnan av leiðslsluni. Vit skulu ikki taka dagar millum leiðslu og fakfelag ella fakfeløg, tí eisini fakfelagið hjá ljósmøðrunum hevur sagt sína hugsan í hesum máli, har hon ikki sær nakað skeivt í ætlanini hjá leiðsluni á LS, men bert loyva okkum at vísa á, at hesar afturvendandi ósemjurnar eru til skaða fyri stovnin og sjúklingarnar. Hetta kann tí ikki góðtakast! Í øðrum lagi má almenningurin fáa eina nøktandi frágreiðing og hartil fáa vissu fyri, at ætlaðu broytingarnar á ongan hátt eru til bága fyri barnakonur og nýføðingar. Hetta er eitt sera álvarsamt mál, sum í roynd og veru eisini er eitt politiskt mál. Tað snýr seg um okkara heilsupolitikk og tí kann hetta skjótt enda á borðinum hjá landsstýrismanninum. Sjúkrahúsleiðslan má tí bera skjótt at og koma á tal við stríðandi partarnar fyri at finna eina sømiliga og haldgóða loysn.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Dimmuoddagrein 24/2: Tjóðveldisflokkurin skal tiga og einki siga

**Niels Juel Arge**
*Hoyvík*



Hevði ikki ætlað mær til tøppaborðið, hvørja ferð oddagrein í Dimmu snávar í sínum metingum og niðurstøðum, men onkuntíð rínir meira við enn aðrar tíðir. Seinast var, tá Dimmuoddagrein vildi hava Tjóðveldisflokkin at halda seg frá uppstilling til bý- og bygdaráð, tí flokkurin skuldi onga ideologi hava. Hesuferð er tað aftur ein Dimmutrongd til at fáa Tjóðveldisflokkin til at tiga og einki siga.

Eftir at tað frættist, at rækjureiðaríir, sum ikki brúka sínar fiskidagar, selja dagarnar til onnur rækjuskip, dittaði ein tinglimur hjá Tjóðveldisflokkinum sær í einum fyrispurningi á tingi at taka hendan tráðin upp. Tað skuldi hon vist ikki havt vágað sær, tí sambært Dimmu (24/2) er orsøkin til, at tinglimurin spyr um hesar handlar, bert, at hon og Tjóðveldis-flokkurin eru ímóti stuðli til rækjuflotan.

Hóskandi kundi man spurt Dimmuleiðaran, um tað veruliga ikki er viðkomandi at vísa á, at skip, sum ikki eru í vinnu meira, selja sínar fiskidagar til onnur skip, sum eru í vinnu og royna at fáa endarnar at røkka saman. Væl kann tað vera, at tað ikki eru upphæddirnar, ið fiskidagarnir verða seldir fyri, ið koppa einum rækjureiðaríi. Og væl kann tað vera, at hetta er í lagi sambært lógini um vinnuligan fiskiskap. Men vanlig fólk spyrja kortini seg sjálvan, hví hesir óbrúktu fiskidagarnir ikki verða latnir inn aftur til landið, so um ikki annað landskassin kann fáa inntøkurnar. Tað kundi Dimmuleiðarin spurt sín egna fiskimálaráðharra.

Ístaðin fyri at royna at gera ein vinnutrupulleika til ein einvegis trupulleika hjá Tjóðveldisflokkinum, kundi Dimmuleiðarin heldur brúkt sína orku til at sett kikaran á sítt egna landsstýri, sum í løtuni millum annað er í ferð við at hoyggja málini millum Føroyar og Danmark til. Feskasta málið (tað um uttanríkisheimildirnar) er nú komið hartil, at landsstýrið, eftir at hava bønað og biðið stjørnina um ikki at skunda tí einsljóðandi grønlandsku lógina ígjøgnum, situr við sviðið soð. Tí hvat gera danir? Jú, júst so sum teir eru vanir. Tað vil siga akkurát tað, teimum lystir - harímillum at snara løgmanni á einum borðiski á (tí annars vøkru) trappuni á Christiansborg.

Sami løgmaður hevði annars í nógv ár sum yndismál at havast at undanfarna landsstýri fyri manglandi opinleika, tá teir samráddust. Í longri tíð var løgmaður tó so afturlatin sum nakar um samráðingarnar um uttanríkismálini: "Einki kann avdúkast í samráðingarstøðu", var niðurlagið. Og loksins vónaði man, at fólkatingsvalið loysti trupulleikan. Hetta var tó bert sum at gera í brøkurnar, og ikki eingang ríkiseindarflokkur nummar eitt, Sambandsflokkurin, sum annars hálovar øllum, ið danir gera og siga, klárar at rekja hesa fløkjuna. Harafturat hevur landsstýrið jú sum aðalmál, at alt skal vera breiðar og ljósareyðar semjur (um kanska serliga at halda Tjóðveldisflokkin uttanfyri), og man vil trods ein ávísan persón ikki seta seg upp ímóti dønum - tað **má** bara ikki síggja út sum konfrontasjón við danir.

Sum støðan er í dag, kann væl eingin undrast yvir, at Tjóðveldisflokkurin og radikali sjálvstýrisvongurin í Fólkaflokkinum (tann upprunaligi Fólkaflokkurin) vann fólkatingsvalið framman fyri sambandsflokkarnar báðar og sambandsvongin í Fólkaflokkinum. Meðan tað hinvegin er vælskiljandi, at sitandi landsstýri og Dimma fortreingja katastrofuvalið, tí hetta vísti, at føroyski veljarin vil ikki hesa ABC-samgonguna. Eins og veljarin vísti á hetta við seinasta løgtingsval. Um tað mundi vóru tó nakrar ávísar ósemjar ov feskar til, at tað kundi renna saman aftur millum stóru sjálvstýrisflokkarnar. Øll politisk søga vísir tó tíbetur, at sovorðin politisk sár lekjast.

Sitandi landsstýrið kann hinvegin ikki renna undan tíðini og enn minni rógva andróður móti henni. Eitt løgtingsval kemur fyrr ella seinni, og tá fær sjálvstýrisvongurin í føroyskum politikki aftur møguleikan at seta dagsskránna.

Tíðin fram til næsta løgtingval kann tó fara at verða nakað strævin, tí í løtuni er búskaparligur stígur í Føroyum, og tað fara sambandskreftirnar stútt og støðugt at brúka sum grundgeving fyri, at føroyingar ikki kunnu klára seg sjálvar.

# Broyt punktgjaldið til umhvørvisgjald

**Arni Abrahamsen**
*Glyvrar*

Nú ætlanir eru um at strika punktgjaldið á ávísum vørum, haldi eg at nú hevði verið eitt fínt høvi at innført eitt sindur av umhvørvispolitikki á hesum øki.

Aðra staðnis er tað heilt vanligt, at støddin av avgjøldum á t.d. hvítvørur er lagt, alt eftir hvussu orkunýtslan hjá vøruni er, og um vøran er umhvørvisvinarlig. Um vøran er orkukrevjandi, so verður hægri avgjald lagt á, og er talan um orkusparandi vøru, so er avgjaldið væl lægri.

Hetta skuldi verið so líka til at innført, nú man er í holt við at pilka við punktgjaldið.

Eg haldi at tað er í fínasta lagið við "atferðsregulerandi" avgjøldum, tá man kann vísa á umhvørvisvinarlig alternativ. So hví ikki strika punktgjaldið á øllum hvítvørum, og í staðin innføra eitt umhvørvisgjald? Og her kundu tær mest umhvørvisvinarligu vørurnar verið avgjaldsfríar, ella nærum avgjaldsfríar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.